

FØROYABANKI

Shipping Føroyar 2008

Saman leggja vit lunnar undir nýggja vinnu

Norðurlandahúsið 7. mars

Skrá:

09.00 **Skráseting og morgunmatur**

09.30 **Vælkomin**

09.35 **Løgmaður setir ráðstevnuna**

09.45 **Shipping: Ein global vinna**
Jan Frits Hansen, varastjóri, Danmarks Rederiforening

10.15 **Samstarv er neyðugt**
Klaus Kjærulff, CEO, Torm A/S

10.45 **Stuttur steðgur**

11.15 **Uppkeyp og skráseting av einum reiðaríi**
John Rajani, leiðari fyri Corporate Finance í Føroya Banka

11.45 **Frálandavinna: Soleiðis gera vit**
Anne Jorunn Møkster, CEO, Simon Møkster Shipping

12.15 **Døgurðasteðgur**

13.30 **Frálandavinna: Vinnuøki fyri føroyingar?**
Albertus Zwiers, tekniskur stjóri, Mærsk Supply Service

14.00 **Innveiting av tænastum**
Lassi Borðoy, stjóri, Sjóvinnudepilin CMM

14.30 **Kaffisteðgur**

15.00 **Framløga av vinnumøguleikum: FAS**
Annfinn V. Hansen, formaður, Reiðarafelagið fyri farmaskip

15.30 **FAS og Framtíðin**
Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna

16.00 **Landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum endar ráðstevnuna**

Tekning á www.industry.fo

Stuðlar: Føroya Banki, Reiðarafelagið fyri farmaskip, Sjóvinnudepilin, Supply Service, Thor, Statoil, BP, Team beredskab, Mærsk.

SENDISTOVAN

Corporate Finance í Føroya Banka:

# Tá tú skalt keypa ella skráseta eina fyritøku

**Corporate Finance-deildin hjá Føroya Banka hevur verið ráðgevi í sambandi fleiri samanleggingar og handlar í føroyskum vinnulívi. Størsta uppgávan higartil var at fáa Statoil Føroyar á føroyskar hendur. Á sama hátt kann deildin vera ráðgevi, tá t.d. reiðarí verða handlað ella skrásett á virðisbrævamarknaði, sigur John Rajani, leiðari á deildini**

Hvussu kann shippingvinnan mennast til at gerast ein týðandi inntøkukelda í Føroyum? Hetta er høvuðspurningurin á ráðstevnuni 7. mars í Norðurlandahúsinum, og ein av fyrilestrarhaldarunum verður leiðarin á Corporate Finance-deildini hjá Føroya Banka, John Rajani.

Corporate Finance er eitt nýtt virkisøki hjá Føroya Banka, sum rættiliga hevur tikið dik á seg. Deildin hevur staðið fyri fleiri týðandi samanleggingum og handlum í føroyskum vinnulívi. Deildin var ráðgevi, tá Farodane, Com Data og Reproz løgdu saman. Eisini tá Elektron og SamTeld løgdu saman, var deildin ráðgevi.

Størsta uppgávan hjá deildini var at vera fíggjarligur ráðgevi hjá framtaksfelagnum Løkir og teimum føroysku fyritøkunum, ið keyptu Statoil Føroyar í heyst. Hesin handil vísti, at Corporate Finance-deildin er før fyri at lyfta torgreiddur og ikki minst altjóða uppgávur.

**Keyp eitt reiðarí**

John Rajani vísir á, at hann eisini væl kann ímynda sær, at deildin verður fíggjarligur ráðgevi, tá eitt heilt reiðarí skal keypast.

– Tá vit tosa um vøkstur í sjóvinnuni, kann hann skapast upp á fleiri mátar. Nøkur reiðarí lata byggja skip, og onnur keypa skip. Tá tú byggir skip, skal alt byggjast upp frá grundini, og keypir tú einstøk skip, verður virksemið avmarkað. Ein skjótur máti at gera íløgu í sjóvinnuna og yvirtaka skip, rakstur og manningar beinanvegin er at keypa eitt reiðarí, sigur hann.

At keypa eitt reiðarí er sjálvandi ein møtimikil íløga, eins og tað var ein stór íløga at keypa Statoil Føroyar. Í tí førinum gingu nógv feløg saman um keypið. Ein annar máti at fáa til vega kapital er at lata feløg skráseta á einum virðisbrævamarknaði og fáa til vega kapital tann vegin, vísir John Rajani á.

- Um eitt felag hevur brúk fyri kapitali fyri at vaksa, ber eisini til at lata felagið skráseta á virðisbrævamarknaði. Vit hava sæð føroyskar fyritøkur sum Føroya Banka, Eik Banka og Atlantic Airways gjørt hetta við stórum hepni. Bestu dømini um fyritøkur, ið hava fingið til vega heilt nýggjan kapital við skráseting, eru Atlantic Petroleum og Faroe Petroleum. Vit kunnu eisini ímynda okkum reiðarí gera hetta, sigur John Rajani.

Hansara fyrilestur á Shipping Føroyar 2008 verður fyrrapartin 7. mars í Norðurlandahúsinum.

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*– Tá vit tosa um vøkstur í sjóvinnuni, kann hann skapast upp á fleiri mátar, sigur John Rajani*